VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og seinnapartin stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið sunnudagin:
Skrið ella stormur av landsynningi og regn. Seinnapartin minkar hann vindin nakað av suðri og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin skrið av landsynningi og suðri og regn, týsdagin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 5 og 9 stig.

Kvørnin melur aftur

Tíðarritið Kvørnin, sum Sands Bygdarsavn gevur út, er komið. Hetta er fimta árið, ritið kemur út

ÚTGÁVA
Edvard Joensen

Sands Bygdarsavn gevur á fimta árið tíðarritið Kvørnina út. Ólavur Clementsen, heimasandsmaður í Hoyvík, hevur ritsjórnað saman við Marnu Jakobsen og Julionnu Joensen á Sandi.

Innihaldið er sum undanfarin ár áhugavert tilfar úr søguni. Bygdarsøga og kvinnusøgur, eins og skrivað er um, tá sýslumaðurin Schrøder stevndi einum 22 ára gomlum fiskimanni úr Skopun.

Stórur partur av blaðnum er um bygdina Skaravanes, og siga útgevararnir í oddagreinini, at á hesum sinni endar ættarsøgan um Skarvanes bygd. Hugvekjandi er, at hon endar rættiliga bókstaviliga eisini, tí í blaðnum er mynd frá jarðarferðini hjá teimum báðu seinastu skarvanesmonnunum Kristoffuri og Oliveri Johannesen á Fjallinum.

Eisini er greitt frá um bátar, útróður, grindaferðir og læknaferðir. Umframt eru søgur frá hoybering á Skarvanesi. Herligar skemtisøgur.

Eisini konufólkini eiga væl av rúmd í blaðnum hesaferð. Høvundarnir siga soleiðis í oddagreinini:

»Konufólkið fær eisini rúm í Kvørnini, mangar áhugaverdar søgur eru um konur á Skarvanesi. Harumframt verða endurgivnar nakrar myndir úr rúgvusmikla myndasvaninum, sum lá eftir Petru í Koytu. Tær báðar systrarnar, Petra og Beata í Koytu, høvdu listarligar gávur, dømi um hetta sæst á Føroya Fornminnissavni, har tvey áseymaði teppi hanga, annað við myndum úr víkingastíð. Myndatól vóru ikki hvørsmansogn tá á døgum, so áhugin hjá Petru fyri myndatøku kemur okkum øllum til góðar nú. Vit høvdu verið fátækari uttan hesar myndir«.

Eisini skúvoyarkonur fáa pláss í kvørnini. Sjúrður Poulsen skrivar grein um neytakonur í Skúvoy.

Kvørnin er hesaferð 64 síður til støddar og kostar 70,- krónur.



Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷7
Nuuk	÷2
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷4
Saint John's	3
Halifax	3
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	6
Lerwick	7
Aberdeen	8
London	10
Tromsø	0
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	4
Keypmannah.	7
Helsinki	0
Moskva	1
Berlin	8
Warzawa	4
Kiev	6
Bukarest	11
Paris	15
Madrid	17
Róm	20
Malorca	22
Athen	20
Malta	21
Tunis	26
Beijing	9
New Dehli	28
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	–
New York	6
Miami	29
Los Angeles	17
Meksikobýur	21
Panama	26
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	21

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1018 hPa. yvir Íslandi fer í landnyrðing. Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað, men brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.

Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið stendur í stað og brúgvalagið til havið sunnan fyri Føroyar gevur nógvan vind og regn á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 30/10 kl. 06⁰⁰– 31/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,6 mm – mált frá 30/10 kl. 06⁰⁰– 31/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 75,9 mm

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

VESTFALLSKYRRINDI

29. okt.: Seinna kvarter
4. nov.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
1. nov	03.14	15.38	02.14	14.38	02.29	14.53	05.14	17.38	06.14	18.38	01.29	13.53	00.29	12.53	03.29	15.53	04.29	16.53	02.59	15.23	04.14	16.38
2. nov	04.01	16.24	03.01	15.24	03.16	15.39	06.01	18.24	07.01	19.24	02.16	14.39	01.16	13.39	04.16	16.39	05.16	17.39	03.46	16.09	05.01	17.24
3. nov	04.46	17.08	03.46	16.08	04.01	16.23	06.46	19.08	07.46	20.08	03.01	15.23	02.01	14.23	05.01	17.23	06.01	18.23	04.31	16.53	05.46	18.08
4. nov	05.31	17.54	04.31	16.54	04.46	17.09	07.31	19.54	08.31	20.54	03.46	16.09	02.46	15.09	05.46	18.09	06.46	19.09	05.16	17.39	06.31	18.54

5 707265 100050 >